# NATO FARIÐ Ú

## Radarin hjá Nato varð mánadagin sløktur, og tað merkir minni eygleiðing av flogferðsluni í Norðuratlantshavi

Randi Jacobsen

Tað eru ikki sooo nógv ár síðan, at Føroyar samtyktu at halda seg uttan fyri allar hernaðarsamtyktir, og kravgongur vóru móti Nato í Føroyum.

Serliga vinstravongurin var ímóti Nato, og høgravongurin legði tey vinstrahallu undir at renna ørindi fyri Sovjet og hini eysturevropeisku londini.

Alt var svart og hvítt.

Kuplarnir á Sornfelli og støðin í Mjørkadali stóðu sum ímyndir upp á óynskt hervald í Føroyum. Støðin var stongt øki.

Nú eru aðrar tíðir, og alt er meira opið og alment.

Talið av starvsfólki í Mjørkadali er svunnið niður í 25, og í summar verða bara 18-19 eftir.

Uppi á Sornfelli verður riggað av.

Mánadagin var dagurin, tá ið radarin hjá Nato endaliga varð sløktur.

Í tí sambandinum var móttøka á støðini á Sornfelli.

### Søgulig løta

Nógvar gestir vóru bodnir til hesa søguligu løtuna. Har var Henrik Dam, ovasti í danska flogvápnum, Arvesen, fyrrverandi ovasti í Mjørkadali, umboð fyri fakfelagið, fyri Fiskiveiðieftirlitið, Tórshavnar kommunu, Ríkisumboðið og onnur.

Nú er tíðarskeiðið hjá Nato í Føroyum av, men Færøernes Kommando heldur fram við at røkja sjóverju og fiskiveiðieftirlit 365 dagar um árið, og flogið verður í 104 dagar um árið.

Henrik Dam, ovasti í danska flogvápnum helt røðu fyri gestunum.

- Eg kenni meg næstan sum heima her, tí fyri 18 árum síðan var eg her í næstan tvey ár, segði hann.

Í 2007 varð farið at skera niður upp á starvsfólk og tænastur í Mjørkadali, og nú fór so uppgávan at eygleiða flogfør fyri Nato.

- Alt er so nógv broytt síðan kalda kríggið.

Henrik Dam tosaði eisini um, hvussu góð minni fleiri fólk hava frá tíðini í Føroyum. Summir hava sligið røtur í Føroyum.

### Tað sivila heldur fram

Nato-radarin er sløktur, men sivili radarin heldur fram við at mala.

Menninir, sum hava havt sítt dagliga arbeiði við at røkja Nato-radaran, missa ikki arbeiði. Fleiri teirra eru komnir upp í árini og skulu frá kortini um nøkur ár. Fyribils fara teir at røkja annað arbeiði.

Eitt nú verður nógv at taka niður á støðini á Sornfelli, og tað fer at taka sína tíð.

Bunkarin á Sornfelli verður ikki sløktur, tí eitt nú Føroya Tele og Kringvarp Føroya leiga seg inn við síni útgerð.







*Tað var ein avbera góður dag, tá ið radarin varð sløktur. Klárt kavaveður við útsýni yvir oyggjarnar heilt út í havsbrúnna. Uppgávan hjá Boje Christensen uppi á Sornfelli er av*